# Skipan til úttøku av venjarum og leiðarum

## Stutt sagt

Ein skipan til at hava greiðar reglur fyri hvussu vit taka út venjarar og leiðarar til landsliðsuppgávur, tað verði seg venjingarlegur, stevnur ella annað virksemi hjá SSF í Føroyum og uttanlanda.

## Mannagongd

Starvsnevnd SSF tilskilar sær rætt at avmarka viðkomandi venjarar og leiðarar til fólk sum vit kenna og hava álit til, frá egnum royndum í SSF-høpi, so sum frá undanfarnum uppgávum vegna SSF.

Nýggj fólk eru vælkomin at bjóða seg fram, og er vanliga gongdin tá at byrja við uppgávum har fleiri eru um uppgávuna, og har meira roynt fólk hevur leiðsluna. Eitt nú landsliðslegur í Føroyum.

Landsliðsvenjarin ella -toymið gera uppskot til úttøkuna, har tey sjálvi eru fyrstaval, og annars onnur í tann mun sum hesi eru skikkaði til uppgávuna, við rotatión um hetta verður mett sum hóskandi.

Allar úttøkur skulu staðfestast av starvsnevnd SSF, sum lýst í reglugerð SSF fyri úttøkur:
https://ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

## Treytir og skyldur

Viðkomandi skal uppfylla og skrivliga ganga undir grundleggjandi treytir SSF til venjarar og leiðarar, sum lýst á næstu síðu.

Væntað verður at viðkomandi eru nærløgd og ábyrgdarfull, at taka sær av teimum uppgávum sum tey eru úttikin til, íroknað at ansa eftir og fáa sum best burturúr liðnum á viðkomandi uppgávu.

## Heimild

Starvsnevndin peikar út ein ella fleiri leiðarar ella venjarar, at hava høvuðsábyrgd fyri liðnum vegna SSF, íroknað at skula traðka til og taka avgerð um okkurt knappliga tekur seg upp.

Viðkomandi tekur so vítt gjørligt avgerð í samráð við starvsnevnd SSF, men kann av neyð taka støðu sjálv/ur. Til dømis um eitthvørt skal gjaldast á staðnum.

## Endurgjald og samsýning

Úttiknu venjarar og leiðarar fáa endurgjald fyri útreiðslur vegna SSF á landsliðsuppgávum, umframt møguliga samsýning sambært reglugerð SSF fyri tænastuferðir:

https://ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-taenastuferdir/

Samtykt av starvsnevnd SSF hin 12. februar 2025

# Grundleggjandi treytir til venjarar og leiðarar í bruttohópi SSF

Undirritaði góðtekur hervið fylgjandi treytir til venjarar og leiðarar í bruttohópi SSF, sum eru tær grundleggjandi afturat møguligum øðrum ásettar í sambandi við viðkomandi ferð:

1) Góðtaka og ganga undir grundreglur ÍSF um ferðaløg

2) Góðtaka og ganga undir reglugerð SSF um tænastuferðir, íroknað ásettu samsýning

3) Loyva SSF at heinta inn barnaváttan um seg, ið tá sjálvsagt skal vera rein

4) Gjøgnumføra fylgjandi skeið, við prógvi til SSF

- ”Antidopingvejledning for trænere og ledere” hjá AntiDoping Danmark
  ella “Coaches of High Performance Education Program (English)” hjá WADA

5) Hartil so vítt gjørligt fylgjandi skeið, við prógvi til SSF

- “Antidoping 1 – for idrætsudøvere” hjá AntiDoping Danmark
  ella “International-Level Athletes Education Program (English)” hjá WADA
- “Unge, krop & trivsel” hjá AntiDoping Danmark

Hartil serliga til ferðaleiðaran við høvuðsábyrgd á ferðini at avgreiða, men í øðrum lagi til annan leiðara/venjara at yvirtaka, ífall at tað skuldi borist ferðaleiðaranum frá:

6) Í samráð við SSF, rinda fyri møguligar útreiðslur hjá sær og liðnum á ferðini, við innheintan av kvittanum ella øðrum prógvi fyri viðkomandi útreiðslur, og eftirfylgjandi uppgerð til SSF

7) Skriva og senda inn ferðafrásøgn til SSF sum lýst í grundreglur ÍSF um ferðaløg

Undirritaði váttar at vilja bera seg at vegna SSF sum tað sømir seg einum umboði á ferð fyri føroyskan ítrótt, og at vilja góðtaka fráveljing um týðandi frávik vísa seg at verða frá hesum.

Undirritaði góðtekur hartil, at uppgávan umfatar at ansa eftir og fáa tað besta burturúr øllum liðnum sum heild, tvs. eisini møguligum íðkarum úr øðrum felag enn sínum egna.

__________________________ ________________________________

Staður og dagfesting Undirskrift